

West Hercules. Mynd: Jógvan H. Gardar

# Maður datt í havið av West Hercules

**Jógvan Hugo Gardar**

20.05.2015 - 10:31

Oljan.fo

Eitt arbeiðsóhapp hendi umborð á boripallinum West Hercules mánadagin. Ein maður datt av pallinum og á sjógv, skrivar energyvoice.

Maersk Clipper, ið er eitt av hjálparskipunum hjá West Hercules kom skjótt á staðið, og fann mannin. Lækni umborð á West Hercules hevur kannað mannin, ið eftir umstøðunum skal hava tað gott.

West Hercules, ið lá á Skálafjørðinum í heyst, er nú á leiðini vestanfyri Newfoundland, har hann ger royndarboringar fyri Statoil.

Statoil og Seadrill, ið eigur West Hercules, skulu nú kanna hví óhappið hendi, og hvat sum kann gerast fyri at fora fyri at slík óhapp henda aftur. Kanadiskir myndugleikar eru eisini kunnaðir um óhappið.